ítróttur
Nr. 66 • fríggjadagur • 8. apríl 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Johan hevði ongan kjans

**FC Midtjylland setti Horsens so staðiliga upp á pláss, meðan tað framvegis er spenningur um, um tað verður Brøndby ella FCK, sum skal spæla í finaluni Kristi Himmalferðardag**

DANSKA STEYPAKAPPINGIN
*Jóannes Hansen*



*Tað var einki at gera hjá Johan Byrial Hansen og liðfeløgunum úr Horsens, tá ið teir mikukvøldið spældu fyrru hálvfinaluna í donsku steypakappingini á heimavølli móti FC Midtjylland. Útiliðið vann 4-0.*
savnsmynd

Tað er eingin ivi um, at FC Midtjylland, sum er næstfremst í superliguni, Kristi Himmalferðardag verður annað finaluliðið í Parkini. Horsens við føroyska landsliðsspælaranum, Johan B. Hansen, á liðnum hevði ongan sum helst kjans, tá ið FCM mikukvøldið var í Horsens og spældi fyrru hálvfinaluna.

Ætlanin hjá Horsens var frammanundan, at spælararnir á teirra liði skuldu vera tættir og ikki geva FCM monnunum møguleika at bjóða av ein ímóti einum. Í Horsens søgdu teir seg vóna at vinna tepurt ella kanska at megna javnleik. Um tað hevði eydnast, so høvdu teir roknað møguleika at vera fyri, at teir í seinnu hálvfinaluni, sum verður mikudagin 20. apríl, fyri fyrstu ferð nakrantíð kundu spælt seg í finaluna.

Horsens hevur tvær ferðir áður verið í hálvfinaluni.

Mikukvøldið legði Horsens rygg til eyðmýkjandi 4-0 tap á heimavølli. Úrslitið kom eitt sindur óvart á Horsens. Teir eru á fremsta plássinum í næstbestu deildini, og harvið eru vánirnar góðar fyri, at teir fara at flyta upp um nakrar vikur. Úrslitið mikukvøldið bendir á, at talan verður um rættuliga stóran setning, tá ið Horsens fer at royna at krøkja seg fast í superliguni.

**Framvegis spennandi**

Í Brøndby var stórur spenningur, og tað er framvegis spennandi undan seinnu hálvfinaluni. Brøndby vann 1-0 á heimavølli. Málskjútti var tólv minuttir undan dystarenda Morten Skoubo. Nakar frammanundan hevði hann eftir flatt innlegg úr høgru fyri opnum málið misnýtt so stóran møguleika, sum tað næstan ikki skal bera til at ímynda sær, at tað ber til at misnýta.

FCK venjarin, Hans Backe, var ikki mildur við sínar spælarar. Eftir óføra avrikið í Odense sunnudagin riggaði einki hjá FCK. Venjarin metti, at hugburðurin hevði verið langt frá tí, sum hann plagar at vera, og FCK venjarin staðfestir, at tað fer ikki at bera til hjá FCK sunnudagin at vinna landskappingardystin ímóti Brøndby og heldur ikki seinnu hálvfinaluna, um spælararnir ikki taka seg heilt øðrvísi saman, enn teir gjørdu mikukvøldið.

Todi var ikki í FCK hópinum. Peter Møller var liðformaður og álopsspælari saman við Álvaro Santos, ið var rættuliga lítið eyðsýndur. Bestu FCK royndina átti Jesper Bech, sum tveitti seg afturav og heilfluktaði í stólpan.

Í útsettari uppgerð í superliguni styrkti Silkeborg um sína støðu, meðan tað sær alt svartari út hjá Herfølge. Silkeborg vann 3-0 á Herfølge á heimavølli. Harvið er Silkeborg farið langt frá botnstrikuni.

# FM í yngru deildunum

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagin 10. apríl 2005 verður spælt um føroyameistaraskapið í borðtennis í yngru deildunum.

Kappingin fer fram í Ítróttarhøllini í Trongisvági, og kappast verður í øllum teimum yngru deildunum, til og við gentu- og dreingjadeildini.

Kappast verður bæði í einmannsleiki og tvímannsleiki.

Hendan kappingin skuldi annars eftir ætlan verið leikt í Tórshavn leygardagin 9. apríl, men av tí at luttakaratalið er sera høgt, uml. 80 leikarir og tað at umstøðurnar ikki eru so góðar í Havnini, til slíkar stórar kappingar, so valdi Borðtennissambandið heldur at flyta hesa kappingina suður til Tvøroyrar, tí har hava tey avbera góðar umstøður til at fyriskipa eina so stóra kapping.

Ístaðin so verður føroyameistaraskapið í eldru deildunum leikt í Havn, hetta verður leygardagin 16. apríl 2005.

# Claus og teir á rættari kós

**Við 2-0 sigri á Nottingham styrkti Coventry rættuliga væl um sína støðu fyri at sleppa undan niðurflyting úr næstbestu deildini**

ENGLAND 1. DEILD
*Jóannes Hansen*



*Claus Bech Jørgensen og Coventry tykjast nú av álvara at verða á veg úr botninum í næstfremstu ensku deildini.*
savnsmynd

Mikukvøldið lætti Coventry sær eitt sindur burtur frá niðurflytingar strikuni í næstbestu deildini í Onglandi. Á heimavølli vann Coventry 2-0 móti gamla stórfelagnum Nottingham Forest. Fyrra málið var brotsspark í 21. minutti, og dygst undan steðginum økti Coventry til 2-0.

Venjarin hjá føroyska landsliðsspælaranum hevði mikukvøldið einki pláss til Claus Bech Jørgensen. Hvørki millum teir fyrstu ellivu ella á beinkinum.

Nú tað resta seks umfør í næstbestu deildini stendur tað illa til hjá Nottingham Forest. Gamla stórfelagið vann meistaraskapin í 1978, og í 1979 og í 1980 vunnu teir europeisku meistarakappingina. Nú eru teir næstaftastir í næstbestu deildini, og tað skal nógv vinnast innaftur, um teimum skal eydnast at sleppa undan niðurflyting.

# Gamal kenningur bjóðar seg fram

**8-mannafarið í Árnafirði ætlast aftur at taka lut í FM kappingini, sum teir í seksti árunum vunnu tríggjar ferðir**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Tað er okkurt, sum bendir á, at ein heilt gamalur kenningur verður við, tá ið tað á Norðoyastevnu í Klaksvík verður farið undir FM kappingina í kappróðri. Talan er um 8-mannafarið í Árnafirði. Árnfirðingur, sum varð smíðaður í 1965, hevur ikki luttikið í kappróðri í mong ár. Nú hava teir í kappróðrarfelagnum í Árnafirði sett bátin í stand. Hann verður flotaður á Vánni í Klaksvík, og tað verður har, at teir fara at venja við honum.

Sambært heimasíðuni hjá Klaksvíkar Róðrarfelag, krf.fo, so verður báturin fyri tað mesta mannaður við árnfirðingum, men onkur avbygdamaður verður við eisini, sum tað verður tikið til. Talan er fyri tað mesta um óroyndar rógvarar.

Árnfirðingur taldist tey fyrstu árini millum teir allar bestu. Bygdin og Norðoyggjarnar allar fylgdu væl við, og tað hilnaðist væl. Árnfirðingur var FM vinnari í 1966, 1967 og í 1968.

Í summar fara tvey 8-mannaför at venja á Vánni í Klaksvík. Nevið Reyða hjá Klaksvíkar Róðrarfelag, sum ikki luttók í kappingini í fjør, er mannað í ár.